Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 10. november 2006

## The War

**Vietnamkríggið hevur á sumri 1970 koppað allari tilveruni hjá Simmons-húskinum. Tey eru flutt, og 12 ára gomlu tvíburarnir, Wtu og Lydia, hava ikki bara mist heimið. Pápin er vorðin heldur løgin, og á gøtuni hótta hini børnini við at stjala einasta frístað teirra - holuna í gamla eikitrænum.**

**DR1 Leygardagin kl. 21.50**



**Slóðarar - Simme Jacobsen**

Faðirin at popptónleikinum í Føroyum. Tað fær illa verið nakar annar enn Simme, munnu flestu okkara vera samd um. Sum orkesturleiðari, musikkundirvísari og ljóðførisseljari hevur hann sligið navn sítt rimmarfast sum ein av fremstu undangongumonnunum í tónleikarsøgu okkara. Og sjálvt um hann nú gongur á 75. ári, hevur hann minni enn so sett guitaran frá sær enn – ei heldur urguna ella klaverið. Nei, Simme er "still going strong". Ikki bara sum tónleikari, men eisini sum yrkjari, málari, skjútti og mangt, mangt annað.

**SvF Sunnudagin kl. 20.00**



**Mr. Nice Guy**

Hvaðani koma vit? Og hvørji eru vit? Hetta eru tveir av spurningunum, sum verða svaraðir, tá brøðurnir Anders og Peter Lund Madsen, Trine Dyrholm, the Robodettes saman við einum orkesturi royna at tekna eina skitsu um fyrstu 75.000 árini hjá mannaættini.

**DR1 Fríggjadagin kl. 19.00**



**Julia Roberts kavalkada**

Fleiri av kendastu filmunum við Juliu Roberts eru á skránni hesa vikuna. Pretty Woman, Pelikan Brief og Mona Lisa Smile eru millum filmarnar, sum hetta vikuskiftið kunnu síggjast á TV3.

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**